Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 24.09.2020 kl. 17:30
Málnr.: 16/01208
Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Gunvá við Keldu, Tummas J. Lervig, Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen, Beinta Klakstein, Atli S. Justinussen, Herfrí J. Sørensen, Steinbjørn O. Jacobsen
Varalimir: Eyðstein Ólason Poulsen for Beinir Johannesen

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
64/20	20/00998-3	Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi - Beinir Johannesen
65/20	18/01402-90	Húsarhaldsskúli - Uppskot frá býráðslimi
66/20	16/00147-14	Samstarvsavtala um felags kommunala tilbúgving í Norðoyggjum til býráðsins samtykt
67/20	13/00768-49	Tilbúgvingarætlan fyri kommunala samstarvið Klaksvíkar Sløkkilið til býráðsins góðkenning
68/20	17/01430-25	Serstøk byggisamtykt fyri ”økisáseting A9 - Oyravegur”
69/20	20/00676-2	Umsókn um sundurbýti og samanlegging
70/20	20/00719-2	Umsókn um marknaumskipan
71/20	20/00775-2	Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 576 í Klaksvík
72/20	20/00864-3	Umsókn um sundurbýti til eigaraíbúðir
73/20	20/00875-3	Umsókn um principielt byggiloyvi til útbygging - matr. nr. 162 í Klaksvík
74/20	20/00898-2	Bygningur norðanfyri Biskupstorg - Íbúðarætlan
75/20	20/00923-2	Kavarin á Borðoyarvík
76/20	20/00930-1	Nýggjur bilur til grót- og tilfarssøluna - Eykajáttan
77/20	20/00840-19	Fíggjarætlan 2021 - Klaksvíkar Býráð. Fíggjarkarmur 2021
78/20	19/00892-59	Fíggjarætlan og roknskapur 2020 - Klaksvíkar Býráð. Meirútreiðslur í samband við Covid-19. Eykajáttan - seinna viðgerð

Til viðgerðar

64/20
20/00998-3 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi - Beinir Johannesen

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	24.09.2020	64/20

20/00998-3 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi - Beinir Johannesen

Frágreiðing um málið:
Beinir Johannsen, býráðslimur, hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja býráðsarbeiðið í samfullar 14 dagar og tí ikki kann møta á býráðsfundinum 24. september 2020. Næstvaldur á valevnislistanum er Eyðstein Ó. Poulsen.

Lógargrundarlag:
- Kommunustýrislógin, § 18, stk. 2:
  Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.
- Kommunustýrislógin, § 18, stk. 3:
  Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar

Fíggjarligar avleiðingar:
Samsýning til tiltakslimin.

Tilmæli:
Býráðið verður at taka støðu til, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.

Klaksvíkar Býráð 24. september 2020:
Einmælt samtykt, at lata Eyðstein Ó. Poulsen taka sæti í býráðnum til fundin.

65/20
18/01402-90 Húsarhaldsskúli - Uppskot frá býráðslimi

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	24.09.2020	65/20

18/01402-90 Húsarhaldsskúli - Uppskot frá býráðslimi

Frágreiðing um málið:

Steinbjørn O. Jacobsen, býráðslimur, hevur sent kommununi skriv, har hann ynskir, at staðsetingin av Húsarhaldsskúlanum verður løgd fyri býráðið aftur.

Eftir galdandi reglum kunnu býráðslimir krevja mál fyri á býráðsfundi. Tó hevur umsitingin kannað, um mál av slíkum slagi, har ikki týðandi nýggir upplýsingar eru í málinum, fellir undir hesa áseting.

Reglan er ikki heilt greið á hesum øki, og tí er niðurstøðan hjá borgarstjóranum tann, at málið í hesum føri eigur at vera lagt fyri, so býráðslimir kunnu umrøða málið opið.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin
§ 32. Nevndarlimur kann, áðrenn ein nevndaravgerð verður sett í verk, krevja, at málið verður lagt fyri kommunustýrið til avgerðar.

Fíggjarligar avleiðingar:
-

Tilmæli:
Tilmælið frá Steinbjørn O. Jacobsen, býráðslimi, er, at hetta mál verður tikið upp av nýggjum við tí endamáli, at kanna, um møguleiki er fyri at staðseta Húsarhaldskúlan í skúlaumhvørvinum, tætt við Tekniska-og HF skúlan, ella á øðrum stað.

Klaksvíkar Býráð 24. september 2020:
Atkvøtt varð um tilmælið frá SOJ um at kanna møguleikan fyri aðrari staðseting av Húsarhaldsskúlanum. Tað fall við 1 atkvøðu fyri (SOJ), 9 atkvøðum ímóti (JS, SVJ, TJL, ÓML, KEZ, BK, GvK, EÓP og HJS), og 1 blankari atkvøðu (ASJ).

66/20
16/00147-14 Samstarvsavtala um felags kommunala tilbúgving í Norðoyggjum til býráðsins samtykt

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska Nevnd	16.09.2020	K-34/20
2 Klaksvíkar Býráð	24.09.2020	66/20

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

16/00147-14 Samstarvsavtala um felags kommunala tilbúgving í Norðoyggjum til býráðsins samtykt

Frágreiðing um málið:
Arbeitt hevur í eina tíð verið við at gjøgnumganga og tillaga tilbúgvingarætlanina fyri Norðoyggjar. Í hesum arbeiði kom fram, at tørvur var á at endurnýggja samstarvsavtalurnar um tilbúgvingina í Norðoyggjum.

Upprunaliga vóru tað Kunoyar og Klaksvíkar kommunur, ið gjørdu samstarvsavtalu um "vanliga eldsløkking" í 2008, og Viðareiðis, Hvannasunds og Klaksvíkar kommunur gjørdu avtalu um "vanliga eldsløkking og útrykking til ferðsluóhapp" í 2010. Hesar avtalur vórðu gjørdar við heimild í tá galdandi Brunalóg, og vóru tær góðkendar av Brunaumsjón Landsins, so sum lógin ásetti.

Í 2017 ynskti Fugloyar kommuna at koma upp í tilbúgvingarsamstarvið í Norðoyggjum. Á felags borgarstjórafundi á heysti í 2017 var full semja um upptøkuna, men ongin formlig avtala varð gjørd og undirskrivað.

Viðmerkjast skal her, at í millumbilinum 2010 til 2017 er Brunalógin farin úr gildi, og Tilbúgvingarlógin komin í staðin.

Umsitingin metir, at ruddiligast er við *einari* nýggjari avtalu millum *allar* kommunurnar í Norðoyggjum, og hesum tekur Tilbúgvingarnevndin undir við. Men formliga avgerðin um at gera eina [nýggja] samstarvsavtalu skal takast á einum kommunustýrisfundi; ein slík avgerð kann ikki avhendast til nevndir, umsiting, borgarstjóra o.s.fr.[1] Tilbúgvingarnevndin hevur tí sent øllum kommunustýrunum í Norðoyggjum áheitan um at gera eina nýggja samstarvsavtalu millum allar kommunurnar í Norðoyggjum um tilbúgvingina, og at gomlu avtalurnar so fara úr gildi.

Tilbúgvingarlógin ásetir, at avtalur um felags kommunala tilbúgving skulu góðkennast av kommunala eftirlitinum sbrt. § 51 í kommunustýrislógini.

Lógargrundarlag:
- Tilbúgvingarlógin (løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2012 um tilbúgving)
- Kommunustýrislógin (løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003)
- Leiðbeining nr. 8000 frá 24. januar 2018 til kommunustýrið, tilbúgvingarnevndina og kommunala tilbúgvingarleiðaran viðvíkjandi skipan av kommunalu tilbúgvingini
- Brunalógin [*avtikin*] (løgtingslóg nr. 78 frá 12. juni 1986 um eldsbruna o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 46 frá 11. mai 2009)

Fíggjarligar avleiðingar:
Rakstur og íløgur hjá Klaksvíkar Sløkkiliði verða fíggjað av samstarvskommununum, har útreiðslurnar verða býttar samsvarandi tali av borgarum í kommununum pr. 31. desember árið fyri.

Tilmæli:
Býráðið verður at taka støðu til, um tað tekur undir við avtaluuppskotinum, sum komið frá einari samdari Tilbúgvingarnevnd.

[1] Leiðbeining nr. 8000 frá 24. januar 2018 til kommunustýrið, tilbúgvingarnevndina og kommunala tilbúgvingarleiðaran viðvíkjandi skipan av kommunalu tilbúgvingini, pkt. 3.1, 4. reglubrot (seinastu tvær reglurnar).

Tekniska Nevnd 16. september 2020:
Málið verið til kunningar.

Klaksvíkar Býráð 24. september 2020:
Einmælt samtykt at taka undir við einari samdari Tilbúgvingarnevnd 2. sept. 2020 um at gera eina nýggja samstarvsavtalu um tilbúgving galdandi fyri allar kommunurnar í Norðoyggjum, og at gomlu avtalurnar samstundis fara úr gildi.

67/20
13/00768-49 Tilbúgvingarætlan fyri kommunala samstarvið Klaksvíkar Sløkkilið til býráðsins góðkenning

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska Nevnd	16.09.2020	K-35/20
2 Klaksvíkar Býráð	24.09.2020	67/20

13/00768-49 Tilbúgvingarætlan fyri kommunala samstarvið Klaksvíkar Sløkkilið til býráðsins góðkenning

Frágreiðing um málið:
Tilbúgvingarlógin frá 2012 ásetir, at tilbúgvingarætlan skal gerast við støði í eini váðameting.

Tilbúgvingarnevndin sendi landsstýrismanninum í tilbúgvingarmálum (Fiskimálaráðið) dagførda tilbúgvingarætlan til viðmerkingar og átekningar og fekk afturmelding haðani seint í 2018. Síðani hevur verið arbeitt við at tilrætta tilbúgvingarætlanina samsvarandi viðmerkingunum, og hevur nevndin á fundi 2. sept. 2020 góðkent eina tillagaða tilbúgvingarætlan, sum ætlandi skal koma í gildi 1. okt. 2020. Tilbúgvingarætlanin skal tó kortini fyrst leggjast fyri kommunustýrið til samtyktar.

Endaligar tilbúgvingarætlanir og endurskoðanir av teimum skulu sendast landsstýrismanninum til kunningar.

Lógargrundarlag:
§ 13 í Tilbúgvingarlógini (Løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2012 um tilbúgving).

Fíggjarligar avleiðingar:
Rakstur og íløgur hjá Klaksvíkar Sløkkiliði verða fíggjað av samstarvskommununum, har útreiðslurnar verða býttar samsvarandi tali av borgarum í kommununum pr. 31. desember árið fyri.

Tilmæli:

Tilbúgvingarætlanin verður løgd fyri býráðið til samtyktar.

Tekniska Nevnd 16. september 2020:
Málið verið til kunningar.

Klaksvíkar Býráð 24. september 2020:
Einmælt samtykt at taka undir við tilbúgvingarætlanini frá tilbúgvingarnevndini 2. sept. 2020.

68/20
17/01430-25 Serstøk byggisamtykt fyri "økisáseting A9 - Oyravegur"

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.09.2020	80/20
2 Tekniska Nevnd	16.09.2020	50/20
3 Klaksvíkar Býráð	24.09.2020	68/20

17/01430-25 Serstøk byggisamtykt fyri "økisáseting A9 - Oyravegur"

Frágreiðing um málið:
Tekniska fyrisiting hevur tikið niðurstøðuna frá Yvirfriðingarnevndini til eftirtektar og hevur innbygd teirra treytir og viðmerkingar aftrat økisásetingunum fyri A9.

Serstaka byggisamtyktin deilir økið í fimm økissløg. Í økið I, II, V verður byggingin løst føst við stødd og snið.
Økið I er ætlða til sethús, økið II til rað-/ tvíhús, meðan V er ætlað til mentanar- og frítíðarendamál. Ímeðan økið III og IV verður eins og A10. Vinaliga sí fylgiskjøl, ið lýsa serstøku byggisamtyktina.



Í summar fingu festararnir Jógvan Joensen, Karl Heri Joensen og Levi Joensen bræv um ætlanina. Eingin viðmerking er komin frá teimum. Sí *Skriv til festarar_Sent og skannað,*

Lógargrundarlag:
Býarskipanarlógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ikki útgreinað.

Skjøl:
Journal nr. 17/01430-24 - Skriv til festarar_Sent og skannað
Journal nr. 17/0130-26: Økisblað A9, Økisblað A10, Fylgiskjal 1_Sethús, øki I og III, A9, Fylgiskjal 2_Raðhús_tvíhús, øki II, A9, Fylgiskjal 3_Økir I til V, Fylgiskjal 4_Økisætlan fyri A9 – Gravarbø, Fylgiskjal 5_Lendisskurður gjøgnum økini I og II, Fylgiskjal 6_Skriv frá Yvirfriðingarnevndini

Tilmæli:
Tekniska fyrisiting mælir til, at uppskot um serstøku byggisamtyktina fyri A9 verður framlagt til almenna hoyring sambært nýggjastu tillagingum frá Yvirfriðingarnevndini.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. september 2020:
KEZ luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 01-09-2020.

Tekniska Nevnd 16. september 2020:
Nevndin tekur undir við UBN 14-09-2020.

Klaksvíkar Býráð 24. september 2020:
KEZ luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Tilmælini frá UBN 14-09-2020 og TN 16-09-2020 einmælt samtykt.

69/20
20/00676-2 Umsókn um sundurbýti og samanlegging

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.09.2020	85/20
2 Klaksvíkar Býráð	24.09.2020	69/20

20/00676-2 Umsókn um sundurbýti og samanlegging

Frágreiðing um málið:
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til sundurbýti av matr.nr. 875 til samanleggingar við matr.nr. 874e.



Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommunan bert ummælandi partur

Tilmæli:
Matr.nr. 875 liggur millum landsvegin og neystagrundirnar: matr.nr. 874b, 874c, 874d og 874e.
Tekniska Fyrisiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:

Við umskipan av matrikul- og ognarviðurskiftum verður mælt til, at nevndu neystaognum verður tryggjaður gongurættur gjøgnum matr.nr. 875.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. september 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 08-09-2020.

Klaksvíkar Býráð 24. september 2020:
Tilmælið frá UBN 14-09-2020 einmælt samtykt.

70/20
20/00719-2 Umsókn um marknaumskipan

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.09.2020	87/20
2 Klaksvíkar Býráð	24.09.2020	70/20

20/00719-2 Umsókn um marknaumskipan

Frágreiðing um málið:
Víst verður til viðheftu umsókn um marknaumskipan millum matr.nr. 708a og 705a (seinni broytt til 805).

Lógargrundarlag:
Matrikulógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommunan bert ummælandi partur

Tilmæli:
Tekniska Fyrisiting mælir til at senda Umhvørvisstovuni málið til tilmæli um at játta.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. september 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 08-09-2020.

Klaksvíkar Býráð 24. september 2020:
Tilmælið frá UBN 14-09-2020 einmælt samtykt.

71/20
20/00775-2 Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 576 í Klaksvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.09.2020	90/20
2 Klaksvíkar Býráð	24.09.2020	71/20

20/00775-2 Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 576 í Klaksvík

Frágreiðing um málið:
Eigararnir søkja um undantaksloyvi til sundurbýti av matr.nr. 576, sum er ábygd við einum sethúsum og einum verkstaðsbygningi. Byggisamtyktarliga er talan um økispart A5 (Blandað íbúðar- og vinnuøki)

Samlaða grundøkjavíddin er 489 m^2. (Minsta mark grundøkjavídd er 300 m^2 fyri sethús og 200 m^2 fyri samanbygd hús og íbúðir)
Ábygdu sethúsini: uml. 110 m^2 og verkstaðsbygningurin uml. 80 m^2.
Verulig ábygging: uml 38%. Loyvd ábygging 35%.

Verkstaðsbygningurin stendur uml. 11 metrar í mark móti granna, og við sundurbýti verður hendan longdin 22 metrar. Byggisamtyktarliga kravið er max 8 metrar.

Undantaksloyvi má sostatt umfata:
- Loyvi til minni grundstykkjavídd enn ásett
- Loyvi til longri bygging framvið marki enn ásett
- Loyvi til størri ábygging enn ásett

Lógargrundarlag:
Matrikullógin
Byggisamtyktin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommunan bert ummælandi partur

Tilmæli:
Umsøkta frávíksloyvi er so mikið umfatandi, at Tekniska Fyrisiting kann ikki viðmæla málinum.

Ætlar nevndin at viðmæla umsóknini, verður neyðugt við grannahoyring, og má umsøkjarin senda inn greiniligar upplýsingar um hvørjar ætlanir eru við sundurbýtinum.
Gjørt verður vart við, at Umhvørvisstovan er mynduleiki á matrikuleringsøkinum, meðan kommunan er ummælandi partur í samband við byggisamtyktarásetingar v.m.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. september 2020:
Nevndin tekur undir við teknisku fyrisiting og metir somuleiðis, at frávikið er ov umfatandi.

Klaksvíkar Býráð 24. september 2020:
Tilmælið frá UBN 14-09-2020 einmælt samtykt.

72/20
20/00864-3 Umsókn um sundurbýti til eigaraíbúðir

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.09.2020	93/20
2 Klaksvíkar Býráð	24.09.2020	72/20

20/00864-3 Umsókn um sundurbýti til eigaraíbúðir

Frágreiðing um málið:
Vísst verður til umsókn um sundurbýti av matr.nr. 1246 og 1247 til eigaraíbúðir.

Tekniska Fyrisiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:

- Byggisamtyktarliga er talan um økispart A10 (Blandað íbúðar- og vinnuøki)
- Grundøkjavídd fyri íbúðir: min 150 m^2
- Matr.nr. 1246 og 1247 er tilsamans 437 m^2 til víddar (svarandi til 87 m^2 í miðal pr. íbúð)

Vísandi til byggisamtyktarligu ásetingarnar um minstu grundøkjavídd pr. íbúð, heimilar lógin ikki matrikulerum sundurbýti, uttan so at kommunan játtar undantaksloyvi.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr.11 frá 3. apríl 1970 um eigaraíbúðir

Fíggjarligar avleiðingar:
-

Tilmæli:
Vísandi til, at talan er um sundurmatrikulering innanfyri verandi bygningskarmar í bygningi framvið upprunaligari handilsgøtu mitt í býnum, hevur Tekniska Fyrisiting ongar viðmerkingar til, at undantaksloyvi verður játtað treytað av,

- at brunaviðurskiftini eru í lagi
- at umsøkjarin sendir inn nágreinað uppbýti av sundurbýtinum
- at matr.nr. 1246 og 1247 verða løgd saman til eina ogn.

Lagt verður samstundis upp til, at hugt verður nærri uppá byggisamtyktarligu ásetingarnar viðv. minsta mark grundøkjavídd í A-økjunum framvið Nólsoyar Pálsgøtu og Klaksvíksvegi.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. september 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-09-2020.

Klaksvíkar Býráð 24. september 2020:
Tilmælið frá UBN 14-09-2020 einmælt samtykt.

73/20
20/00875-3 Umsókn um principielt byggiloyvi til útbygging - matr. nr. 162 í Klaksvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Havna- og Vinnunevndin	14.09.2020	32/20
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.09.2020	96/20
3 Ferðslunevndin	17.09.2020	28/20
4 Tekniska Nevnd	16.09.2020	58/20
5 Klaksvíkar Býráð	24.09.2020	73/20

20/00875-3 Umsókn um principielt byggiloyvi til útbygging - matr. nr. 162 í Klaksvík

Frágreiðing um málið:
Vegna fyritøku søkir Byggivirkið KBH Sp/f um prinsipielt loyvið at byggja ein hjall/goymslubygning uppí verandi bygning á matr. nr. 162, Klaksvík.

Tørvur er á plássi til ein hjall til línuframleiðsluna, og hartilhoyrandi meira goymslupláss.

Orsøkin til økta tørvin er, at fyritøkan ætlar at flyta nevndu framleiðslu úr Søldarfirði, norður til Klaksvíkar.

Áðrenn meira ítøkilig projektering verður gjørd, ynskir leiðslan í fyritøluni at vita hvar, og í hvussu stóran mun er møguligt at útbyggja á umrødda havnaøki.

(Ynskilig er at ynski nr. 1 er uml. 200m², um pláss er til tess).

Lógargrundarlag:
Umsøkta liggur í Vinnu- og mentunnarøki, har loyvt er at byggja 60% av tí samlaða økinum, og bygningshædd í mun til bryggjuhædd er (í mesta lagi) 13 m.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ein ávís inntøka til Klakvíkar havn.

Tilmæli:
Umsøkta bygging og nýtsla er innanfyri karmarnar í økisásetingini, og mælir tekniska fyrisiting í prinsippinum at játta ynski 1, (eitt økið í er 5 m frá gl. Ídni, niðan móti parkeringsplassinum og oman á niðaru síðu av verandi bygningi, um so er, at økið ikki er ætla til annað endamál.
Í sama viðfangi verður neyðugt at dagføra leigusáttmálan hjá Berglon so hann samsvarar við møguliga samtykta økta vídd.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. september 2020:
Nevndin mælir til, at økið norðanfyri verður nýtt til ætlanina, og í øðrum lagi tilsvarandi øki í stødd sunnanfyri.

Havna- og Vinnunevndin 14. september 2020:
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 14-09-2020, men leggur áherðslu á økið norðanfyri.

Tekniska Nevnd 16. september 2020:
Ein meiriluti, ÓML, TJL og BK, tekur undir við HaVN 14-09-2020.
Ein minniluti, SOJ og ASJ, tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-09-2020.

Ferðslunevndin 17. september 2020:
Nevndin tekur undir við ferðsluliga partinum av málinum.

Klaksvíkar Býráð 24. september 2020:
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í TN 16-09-2020; tað varð samtykt við 9 atkvøðum fyri (JS, SVJ, TJL, KEZ, ÓML, BK, GvK, EÓP og HJS) og 2 atkvøðum ímóti (ASJ og SOJ).

74/20
20/00898-2 Bygningur norðanfyri Biskupstorg - Íbúðarætlan

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.09.2020	107/20
2 Havna- og Vinnunevndin	14.09.2020	39/20
3 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	15.09.2020	20/20
4 Klaksvíkar Býráð	24.09.2020	74/20

20/00898-2 Bygningur norðanfyri Biskupstorg

Frágreiðing um málið:
28. august 2020 fekk fyrisitingin eina fráboðan frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum um, at ætlaða byggisamtyktin fyri E1, sum er miðbýarøki, er góðkend av Býarskipanarnevnd Landsins.

Sostatt resta einans formlig viðurskifti, áðrenn farast kann í gongd við eina bygging av bygningi/um í byggiøki 5 og 6 í øki A (bygningur norðanfyri Biskupstorg).

Møguleiki er í byggiøki 5 at byggja ein bygning við einum fótatraðki á umleið 280 fermetrar, sum er upp til 16 metrar, yvirgrind móti Torgi 10 metrar, og í byggiøki 6 ein bygning við einum fótatraðki á umleið 250 fermetrar, sum er upp til 13 metrar, yvirgrind móti Torgi 7 metrar.



Ymiskir hættir hava áður verið brúktir í samband við íbúðarbygging, har okkurt dømi er um bygging saman við Bústaðum, meðan talan eisini hevur verið um bygging, har alt intiativið er komið frá privatum aktørum. Eisini er beinleiðis heimilað kommunum at byggja eldraíbúðir til fólk, sum eru 60 ár og eldri, meðan ein annar leistur er lutaíbúðir, sum onnur kommuna í landinum hevur sett í verk.

Í hesum føri hevur leiðslan í kommununi heitt á umsitingina at kanna møguleikan við lutaíbúðum nærri, tá talan í einum slíkum føri kann gerast um ein yvirkomuliga íløgu hjá onkrum, sum til dømis flytur úr einum húsum til íbúð, har tann mánaðarliga leigan verður munandi lægri enn um talan var um reinar leiguíbúðir.

Tað er einari ætlan um lutaíbúðir, sum nú verður biðið um heimild at arbeiða meira konkret við, við tí í hyggju at stuðla uppundir, tó uttan beinleiðis luttøku, í einari verkætlan, har eitt lutaíbúðarfelag stendur fyri bygging á økinum norðan fyri Biskupstorg.

Kommunan kann í hesum føri gera uppskot til tekningar, kanna ymiskar kostnaðir og fyrireika stovnanina av lutaíbúðafelagnum.

Hetta er neyvt sami leistur, sum onnur kommuna í landinum hevur sett í verk.

Viðvíkjandi veghæddini, sum skal hava útvent virksemi, er upplagt at talan gerst um kommunalt virksemi, ella alternativt, at lutaíbúðarfelagið ger samstarv við privatar aktørar um veghæddina.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin
Løgtingslóg um lutaíbúðafelag

Fíggjarligar avleiðingar:
Ávísar fíggjarligar avleiðingar kunnu liggja í einari víðari planlegging av miðbýnum.

Tilmæli:
Mælt verður til, at umsitingin fær heimild at arbeiða víðari við málinum, sum omanfyri lýst.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. september 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-09-2020.

Havna- og Vinnunevndin 14. september 2020:
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 14-09-2020.

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 15. september 2020:
Nevndin tekur undir við UBN og HVN, dagf. 15-09-2020.

Klaksvíkar Býráð 24. september 2020:
Tilmælini frá UBN og HaVN 14-09-2020 og E&B 15-09-2020 einmælt samtykt.

75/20
20/00923-2 Kavarin á Borðoyarvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.09.2020	101/20
2 Havna- og Vinnunevndin	14.09.2020	35/20
3 Mentanarnevndin	15.09.2020	45/20
4 Fíggjarnevndin	22.09.2020	69/20
5 Klaksvíkar Býráð	24.09.2020	75/20
6 Klaksvíkar Býráð	22.10.2020	

20/00923-2 Kavarin á Borðoyavík

Frágreiðing um málið:
Umboð fyri áhugabólk hevur vent sær til kommununa við verkætlan at gera ein kavara á stabban á Borðoyavík.

Kommunan hevur áður játtað at tryggja stabban soleiðis, at hann ikki fer í havið, og nú er konkretur fyrispurningur komin um at gera eitt listaverk á hann.

Limir í áhugabólkinum skulu ætlandi evna sjálvan kavaran til úr stáli, samsvarandi hjáløgdu myndunum, meðan bólkurin annars er mannaður av kassameistara og skrivara.

Endaliga projektið er enn ikki komið til kommununa, men metingin er, at verkætlanin kemur at kosta kommununi umleið kr. 100.000 og at útsjóndin verður sum hjáløgdu myndirnar
Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kr. 100.000 verða fluttar frá *Vinnumenning* undir grein 7 til *stuðul til mentanar- og ítróttarendamál* undir grein 5.

Tilmæli:
Mælt verður til at taka undir við verkætlanini og at flyta kr. 100.000 frá *vinnumenning* til *stuðul til mentanar- og ítróttarendamál*.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 14. september 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-09-2020.

Havna- og Vinnunevndin 14. september 2020:
Ein meiriluti, TL, ÓML, KEZ og BJ tekur undir við UBN, dagf. 14-09-2020, men mælir til at tað verður fíggjað beinleiðis frá Vinnumenning við tilvísing til Havna- og vinnunevndina.
Ein minniluti, GVK, tekur undir við UBN, dagf. 14-09-2020.

Mentanarnevndin 15. september 2020:
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 14-09-2020.

Fíggjarnevndin 22. september 2020:
Ein meiriluti, SVJ, GvK og HJS, tekur undir við UBN 14-09-2020, minnilutanum í HaVN 14-09-2020 og MeN 15-09-2020.
Ein minniluti, JS og TJL, tekur undir við meirilutanum í HaVN 14-09-2020.

Klaksvíkar Býráð 24. september 2020:
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í HaVN 14-09-2020 og minnilutatilmælið í FíN 22-09-2020; tað fall við 3 atkvøðum fyri (JS, KEZ og TJL), 7 atkvøðum ímóti (SVJ, BK, GvK, ASJ, EÓP, HJS og SOJ) og 1 blankari atkvøðu (ÓML).
Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá UBN 14-09-2020, minnilutatilmælið í HaVN 14-09-2020 og meirilutatilmælið í FíN 22-09-2020; tað varð einmælt samtykt við 11 atkvøðum fyri.

76/20
20/00930-1 Nýggjur bilur til grót- og tilfarssøluna - Eykajáttan

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Havna- og Vinnunevndin	14.09.2020	37/20
2 Fíggjarnevndin	22.09.2020	70/20
3 Klaksvíkar Býráð	24.09.2020	76/20
4 Klaksvíkar Býráð	22.10.2020	

20/00930-1 Nýggju bilur til grót- og tilfarssøluna – flyting frá rakstri til íløgu

Frágreiðing um málið:
Bilurin hjá grót- og tilfarssøluni, sum er ein Mitsubishi frá 2005, var fyri nøkrum vikum síðan til sýn og talan gjørdist um 12 ymisk viðurskifti, ið skuldu fáast í rætt lag, áðrenn møguligt umsýn. Bilurin varð keyptur fyri 15 árum síðan fyri umleið 400.000 kr. og hevur sostatt tænt fyri seg.

Í skrivi vísir leiðari í Smiðjuni á, at umvælingarnar, sum eru neyðugar fyri at fáa bilin ígjøgnum sýn – og sostatt ikki snúgva seg um øll brek við bilinum – kosta 53.000 kr., sum er ein alt ov stór upphædd at umvæla ein so mikið gamlan og slitnan bil fyri.

Leiðarin í Smiðjuni, leiðarin í Grótbrotinum og undirritaði vilja sostatt mæla til, at hesin bilurin verður seldur/burturbeindur og at annar sambærligur bilur verður keyptur í staðin, heldur enn at gera eina umvæling nú fyri at standa í líknandi støðum aftur um stutta tíð.

Mett verður, at ein nýggjur bilur av umleið sama slag kostar 300.000 við kommunu-MVG.

Orsakað av, at sølan higartil í ár hevur verið góð, samstundis sum eitt tíðarskeið var, har einans ein løn var at gjalda hjá grót- og tilfarssøluni, umframt at stóra maskinan hjá grót- og tilfarssøluni var útleigað til íløguna í mold/eyrmóttøkuna í vár, so tykist úrslitið hjá grót- og tilfarssøluni í ár at gerast so mikið gott, at keypið av bilinum kann rúmast innan fyri verandi rakstur, um árið restina av árinum háttar seg sum higartil.

Roknskapardeildin upplýsir, at rættast er at gera flyting millum kontur frá rakstri til íløgu.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Flyting millum kontur á kr. 300.000 verður gjørd ímillum grót- og tilfarssølan rakstur til íløgu.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndirnar og býráð taka undir við íløguni í nýggjan bil og at henda íløga verður fíggjað við flyting millum kontur frá rakstrinum hjá grót- og tilfarssøluni til íløgu hjá grót- og tilfarssøluni.

Havna- og Vinnunevndin 14. september 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-09-2020 og mælir til at miðað verður eftir, at bilurin hevur tann bláa litin hjá Klaksvíkar kommunu.

Fíggjarnevndin 22. september 2020:
Nevndin tekur undir við HaVN 14-09-2020.

Klaksvíkar Býráð 24. september 2020:
Tilmælini frá HaVN 14-09-2020 og FíN 22-09-2020 einmælt samtykt.

77/20
20/00840-19 Fíggjarætlan 2021 - Klaksvíkar Býráð. Fíggjarkarmur 2021

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	22.09.2020	65/20
2 Klaksvíkar Býráð	24.09.2020	77/20

20/00964-2 Fíggjarætlan og roknskapur 2021 - Klaksvíkar Býráð. Fíggjarkarmur 2021

Frágreiðing um málið:
Sambært kommunulógini skal býráðið samtykkja tann yvirskipaða fíggjarkarmin fyri komandi ár áðrenn 1. oktober.
Á niðanfyri standani talvu er gongdin lýst senastu fýra árini. Samlaði árligi vøksturin í rakstrarútreiðslunum seinastu fýra árini hevur verið 5,3%. Ein munandi partur av hesum vøkstri stavar frá eldraøkinum. Útreiðslurnar hækkaður í 2017 frá 170 mió.kr í 2016 til 189 mió.kr. í 2017. Um hugt verður at vøkstrinum seinastu trý árini hevur vøksturin verið 3,2%. Tá verður roknað við, at raktsturin í 2020 verður í trá við fíggjarætlan 2020.
Fyriliggjandi uppskot til karm leggur upp til at raksturin hækkar við 2,7%

Klaksvíkar kommuna	Fíggjarætlan 2021					
Rakstrarstøð	Roknsk.	Roknsk.	Roknsk.	F.ætlan I	F.ætlan II	F.ætlan
1.000 kr.	2017	2018	2019	2020	2020	2021
Rakstrarútreiðslur	188.920	199.035	202.913	207.600	207.851	213.500
Rentustuðul	3.728	3.648	3.675	3.600	3.600	3.600
Rentuútreiðslur v.m	9.299	6.315	3.076	3.400	3.400	3.400
Fíggjarútreiðslur	13.027	9.964	6.751	7.000	7.000	7.000
Rakstrarútreiðslur tilsamans	201.947	208.998	209.664	214.600	214.851	220.500
Inntøkur tilsamans	-267.867	-271.692	-288.432	-295.000	-295.000	-295.000
Rakstrarúrslit	-65.920	-62.694	-78.768	-80.400	-80.149	-74.500
Íløgur	78.427	75.864	106.292	76.400	113.845	70.000
RLÚ	12.508	13.169	27.524	-4.000	33.696	-4.500

Inntøkurnar eru hækkaðar seinatu fýra árini við 4,1% árliga. Seinastu trý árini er talan um 3,3%. Persónskatturin og forskattingin av eftirlønum hava verið nakað hægri. Partafelagsskatturin og afturberingin ísv FAS,DIS vm. hevur verið á sama støði øll árini.

Klaksvíkar kommuna	Fíggjarætlan 2021					
Rakstrarstøð	**Roknsk.**	**Roknsk.**	**Roknsk.**	**F.ætlan I**	**F.ætlan II**	**F.ætlan**
1.000 kr.	**2017**	**2018**	**2019**	**2020**	**2020**	**2021**
Kommunuskattur	-200.427	-202.310	-217.102	-225.000	-225.000	-230.000
Húsaleiguskattur		-154	-62	0	0	0
Felagsskattur	-21.195	-21.097	-18.730	-18.000	-18.000	-12.000
Skattur av eftirlønargjøldum	-34.398	-36.749	-41.385	-41.000	-41.000	-42.000
Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir	-11.847	-11.381	-11.152	-11.000	-11.000	-11.000
Inntøkur tilsamans	**-267.867**	**-271.692**	**-288.432**	**-295.000**	**-295.000**	**-295.000**

Í samband við fíggjarkarmin 2021, eru inntøkurnar mettar at vera tær somu sum í fíggjarætlanini 2020. Persónskatturin og forskattingin av eftirlønum hækka við 6 mió.kr. Mett verður at partafelagsskatturin kemur lækka, og út frá hesum er mett, at talan verður umleið 6 mió.kr.

Tí verður mælt til at niðanfyri standandi fíggjarkarm fyri fíggjarætlan hjá Klaksvíkar kommunu í 2021.

Fíggjarkarmur 2021	**2021**
Inntøkur	-295.000
Rakstur	213.500
Rakstaravlop	**-81.500**
Rentustuðul	3.600
	-77.900
Rentur	3.400
Rakstrarúrslit	**-74.500**
Íløgur	
Úrslit áðrenavdráttir	

Lógargrundarlag:
Kommunulógin

Fíggjarligar avleiðingar:

Tilmæli:
Framfyri uppskot til fíggjarkarm, verður hervið lagt fyri fíggjarnevnd og býráð til støðutakan.

Klaksvíkar Býráð 24. september 2020:
Tilmælið frá FíN 22-09-2020 einmælt samtykt.

78/20

19/00892-59 Fíggjarætlan og roknskapur 2020 - Klaksvíkar Býráð. Meirútreiðslur í samband við Covid-19. Eykajáttan - seinna viðgerð

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	23.06.2020	62/20
2 Klaksvíkar Býráð	25.06.2020	55/20
3 Klaksvíkar Býráð	24.09.2020	78/20

19/00892-59 Fíggjarætlan og roknskapur 2020 - Klaksvíkar Býráð. Meirútreiðslur í samband við Covid-19

Frágreiðing um málið:
Í samband við Covid-19, hevur umsitingin mett um hvørjar meirútreiðlsur og minni brúkaragjøld kommunan hevur havt í hesum sambandi. Yvirskipað eru fylgjandi økir rakt. Barnaansingargjøld, Atlantis, Kt og reingerð v.m, Eldraøkið og Ítróttar- og frítíðarfelagsskapir.

Tá ið korona varð staðfest, bleiv alt arbeiði lagt stilt. Tey sum høvdu møguleika fyri at arbeiða heimanífrá gjørdu tað. Hetta hevði í sjálvum sær ongar meirútreiðslur til lønir við sær, men kravdi at arbeiði í ein ávísan mun skuldi umskipast.

Í samband við barnaansingargjøldini er talan um, at dagstovnarir vóru stongdir í umleið tveir mánaðar. Tó var lutvíst opið trýggjar vikur í endanum av tíðarskeiðnum. Inntøkurnar ísv barnaansning er umleið 650 t.kr. um mð. Fyri tveir mánaðar er tí talan um 1,3 mió.kr. Gjaldið fyri lutvísu ansingina tær seinast trýggjar vikurnar, verður mett til áleið 100 t.kr. Sostatt er talan um mistar inntøkur á umleið 1,2 mió.kr. ísv barnaansingina.

Virksemi hjá Atlantis var hart rakt av farsóttini. Gjørd var ein uppgerð sum vísti á ein tørv á 250 t.kr. Henda meirútreiðsla er avgreidd sum eykajáttan.

Í samband við at álagt var starvsfólkum at arbeiða heiman ífrá, hava verið nakrar meirútreiðsur í samban við KT. Tørvur hevur verið á nakað av ráðgeving í samband við at skipa heima arbeiðspláss. Eisini var tørvur á at umskipa skrivstovupláss, eftir at byrja var aftur. Reglur um frástøðu. Reingerð og reinhald hevur eisini kravt nakað. Á dagstovnunum hevur verið gjørt meira reint. Umframt útgerð til sóttreinsan. Tað er eitt sindur trupult at meta um hesar meirútreiðslur. Umleið 50-70 t.kr.

Eldraøkið er uttan iva harast rakt í samband við Covid-19. Mett verður at eykaútreiðslurnar tann fyrsta mánaðin vóru umleið 200 t.kr. síðan bleiv tað nakað minni tí tamarhald fekst á smittuni. Nú lati verður upp aftur verður roknað við munandi meirútreiðslum ísv. test. Tann ætlan um test sum arbeitt verður við, verður mett at kosta umleið 20 t.kr. um vikuna. Tí verður roknað við, at meirútreiðsurnar fram til septemder verða á leið 150-200 t.kr. um mð. Hetta treytað av ongari nýggjari smittu. Samtikið er metingin, at meirútreiðslurnar á eldraøkinum verða umleið 900 t.kr.

Tað eru komnir fleiri fyrispurningar frá Ítróttar- og frítíðarfelagskapum um nakar møguleiki er fyri at fáa stuðul í samband við Covid-19. Tað er einki játtað í hesum sambandi.

Samanumtikið er metingin, at kendar meirútreiðslur og minni inntøkur verða tilsamans umleið 2,5 mió.kr.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Lógargrundarlag:
Kommunulógin v.m.

Fíggjarligar avleiðingar:
Meirútreiðslur og minni inntøkur á umleið 2,5 mió.kr. í 2020

Tilmæli:
Verður hervið lagt fyri fíggjarnevndina til kunningar.

Fíggjarnevndin 23. juni 2020:
Nevndin tekur kunningina til eftirtektar og mælir til, at fíggjað verður av *tøkum peningi*.

Klaksvíkar Býráð 25. juni 2020:
Tilmælið frá FíN 23. juni 2020 einmælt samtykt við fyrru viðgerð.

Klaksvíkar Býráð 24. september 2020:
Tilmælið frá BýR 25. juni 2020 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.